# Góð hjálp til fyrstuhjálp

**Oljufeløgini, sum seta borin í føroyska landgrunnin, eru ein høvuðsorsøk til, at føroyingar fáa eina dygdargóða føroyska bók um fyrstuhjálp til keyps fyri ein bíligan penga. Afturvið høvuðsbókini fæst eisini ein lummabók, sum er hent at hava í neyðini**

FYRSTAHJÁLP
*Ingi Rasmussen*


*Týðarin og útgevarin, Richard Schwartson og Niels Jákup Thomsen, eru báðir fegnir um stuðulin, sum oljufeløgini hava latið til fyrstu fyrstuhjálparbók føroyinga*

*Mynd: Jens K. Vang*

Áðrenn hetta árið er runnið, hava føroyingar fingið sína fyrstu stóru bók um fyrstuhjálp. Talan verður um eina næstan 300 síður langa bók, ið fer niður í hvønn smálut. Umframt hana verður ein minni bók at fáa afturvið, ið er skjót og góð at sláa upp í, tá óhappið hendir.

FOÍB, bólkurin av oljufeløgum, sum ætla at bora við Føroyar, hevur stuðlað útgávuni við 300.000 krónum. Uttan hendan stuðulin høvdu bøkurnar valla sæð dagsins ljós.

– Bókin fer einans at kosta ein hundraðkrónuseðil, og tað kunnu vit takka oljufeløgunum fyri. Var tað ikki fyri stuðulin, hevði Bókadeild Føroya Lærarafelags als ikki hættað sær undir verkætlanina, tí vit hava ikki pengar til slíkar útgávur, sigur Niels Jákup Thomsen frá Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið stendur fyri at geva bókina út í Føroyum.

## Stórt samprent

Talan er um eitt samprent av heimskenda bestseljaranum »First Aid Manual« hjá forlagnum Dorling Kindersley. Bókin er týdd til nógv mál og er útgivin í fleiri milliónum eintøkum. Í Noregi er hon seld í meira enn 100.000 eintøkum.

Richard Schwartson týðir bókina til føroyskt, og tað er eisini hann, sum hevur gingið undan í at fáa bókina í verðina.

– Hugskotið er, at fyrstuhjálparbókin skal vera atkomilig hjá so nógvum fólkum sum gjørligt, og stuðulin ger, at vit kunnu selja bókina so bíliga, at tað skuldi verið borið til hjá hvørjum húsarhaldi at ogna sær hana, sigur Richard Schwartson.

Í fyrstu atløgu verður bókin prentað í 5.000 eintøkum, og tað er nógv eftir føroyskum mátistokki. Hon verður latin føroyingum umbrotin á fløgu við opnum plássi til tekst.

## Heima og úti

Høvuðsbókin er góð bæði til at hava í heiminum og til skúlabrúks. Eitt nú kann hon brúkast í lívfrøði, tí gjøgnumgongd er av mannakroppinum til hvørt einstakt brot. Bakgrundsupplýsing og grundleggjandi mannagongdir eru at finna og dentur verður lagdur á lívbjarging av fólkum í øllum aldri.

Lummaútgávan inniheldur allar grundleggjandi mannagongdir fyri, hvussu tú ferst um meiri enn 70 vanligum skaðar og tilburðir, ið tørva skjóta hjálp.

– Bøkurnar broyta ikki ta sannroynd, at tað er skilagott at fáa sær skeið í fyrstuhjálp, men nógv er eisini sunn fornuft. Hvussu gerst tú, um onkur bløðir illa. Hvat um onkur brennur seg. Slíkt gevur bókin svar uppá, og tað kann vera gott í eini handavending. Handbókin er uppløgd at hava í eitt nú skipum, bilum ella á arbeiðsplássum, sigur Richard Schwartson.

## Hárfín javnvág

Umsetingin er ein avbjóðing hjá Richardi Schwartson. Tað ræður um at finna røttu javnvágina bæði fakliga og málsliga. Bókin skal vera røtt fakliga, men kortini ikki á einum máli, sum bara fakfólk skilja. Hon skal skrivast á góðum føroyskum, men hinvegin má hon liggja so tætt at talaða málinum, at fólk skilja tað.

– Tað má ikki henda, at fólk ikki skilja tað, sum greitt verður frá, tí so er bókin ónýtilig, sigur Richard Schwartson.











# Ársins arbeiðspláss skal kjósast

**Arbeiðarafeløgini taka dystin upp við arbeiðsgevararnar og fara komandi árini at velja Ársins arbeiðspláss. Málið er at bøta um arbeiðsumhvørvið og økja trivnaðin á arbeiðsplássunum, sigur Svein Rógvi Nielsen, sum hevur fingið hugskotið**

ARBEIÐSPLÁSS
*Ingi Rasmussen*



*Svein Rógvi Nielsen er drívmegin aftan fyri at velja Ársins arbeiðspláss, sum er partur av hansara høvuðsuppgávu á Tekniska skúla*

*Mynd: Jens K. Vang*

Í fleiri ár hava arbeiðsgevararnir valt Ársins virki í Føroyum, og tað hevur verið ein stórur heiður at verða kosið. Nú taka arbeiðarafeløgini dystin upp. Tey ætla sær at útnevna Ársins arbeiðspláss, og tað verður ongin minni heiður at fáa herðaklappið frá arbeiðsfólkunum.

Ársins arbeiðspláss verður útnevnt fyrstu ferð fríggjadagin 13. juni 2003, og tað eru tey fimm arbeiðarafeløgini í Føroyum, sum kjósa vinnaran. Hugskotið eigur Svein Rógvi Nielsen, sum lesur framleiðslutøkni á Tekniska skúla í Havn. Hann hevur fingið íblástur úr Danmark, har SID hvørt ár skipar fyri Ársins virki.

Málið er at fáa eitt betri arbeiðsumhvørvi á størri arbeiðsplássum í Føroyum.

– Vinnandi virki fær eitt diplom, og tað verður sæð sum ein stórur heiður aðrastaðni at gerast Ársins arbeiðspláss. Men tað loysir seg eisini. Tí tað kann ávísast, at trivnaður á virkjum eisini gevur eitt betri rakstrarúrslit. Vit vóna, at arbeiðsgevararnir taka væl undir við hesum og at virkini leggja seg eftir at bøta um arbeiðsumhvørvið – bæði til teirra egna besta og til frama fyri arbeiðsfólkini, sigur Svein Rógvi Nielsen.

## Størri virki

Kappingin er skipað á tann hátt, at álitisfólkini á arbeiðsplássum við fleiri enn 25 arbeiðsfólkum innan tey fimm arbeiðarafeløgini fáa eitt tilmeldingarskjal. Vónin er, at 10 stór virki taka við avbjóðingini. Arbeiðsfólkini á virkjunum fáa síðan eitt spurnarblað, har tey vera biðin um at svara 16 spurningum um virki. Tað kann vera spurningar um lønina, um fólk eru hugagóð, um leiðslan lurtar eftir teirra sjónarmiðum og um øll verða janvsett.

Út frá hesum verða trý virki vald út til finaluumfarið.

Dómsnevndin fer síðan út at leggja arbeiðsplássini undir lupp. Har kanna tey, um virki veruliga ger nakað fyri at bøta um arbeiðsumhvørvið, og um starvsfólkini tala satt.

Svein Rógvi Nielsen óttast ikki fyri, at arbeiðsgevararnir fara at seta seg ímóti.

– Vit koma ikki fyri at sneyta, og onki loyniligt verður avdúkað. Tvørturímóti eru tað góð virki, sum eru komin so langt, so tað er ein heiður at fáa vitjan, sigur Svein Rógvi Nielsen.

## Løn og umhvørvi

Treytin fyri at koma upp á tal er, at talan er um ein fysiskan aktivitet sum eitt nú á fiskavirkjum. Vilja virkini koma upp á tal, so eru nakrar góð ráð at fáa.

Talan skal vera um eitt gott samstarv millum leiðslu og arbeiðsfólk. Ein góðan sosialan profil, har familju- og sosialpolitikkurin er livandi. Ein sunnan økonomiskan rakstur og at hava evni at menna virkið. Góð lønarviðurskifti og arbeiðsumhvørvi. Og góðar útbúgvingarmøguleikar fyri arbeiðsfólkið.

Svein Rógvi Nielsen er í fyrsta bólkinum, sum lesur framleiðslutøkni á Tekniska skúla í Havn. Talan er um tvey ára útbúgving, og Ársins arbeiðspláss er hansara høvuðsuppgáva. Men meiningin er, at hetta skal gerast ein fastur táttur, so Ársins arbeiðspláss verður útnevnt ár eftir ár. Eins og Ársins virki hjá arbeiðsgevarunum.

Í dómsnevndini sita Sakaris Hansen fyri Havnar arbeiðsmannafelag, Hanna Isaksen fyri Klaksvíkar arbeiðskvinnufelag, Ingeborg Vinther fyri Føroya arbeiðarafelag, Kristoffur Olsen fyri Klaksvíkar arbeiðsmannafelag, eitt umboð fyri Rasmussen & Weihe, og Svein Rógvi Nielsen sjálvur.


